almannaverkið

# Váttan frá optikara/eygnalækna

(umsókn um ískoyti til brillur, kontaktlinsur o.a. út frá einari fíggjarligari meting)

sambært lóg um almannatrygd og tænastur § 19 stk. 1 ella almannapensjónslógini § 12 stk. 1

**Upplýsingar umsøkjarans**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Navn | | | | P – tal | |
| Navn barnsins (um søkt verður vegna barn) | | | | P – tal | |
| Bústaður | | | | Fartelefon | |
| Býur | | Postnr. | | Telefon | |
| Teldupostur | | | | | |

**Viðgerðarætlan**

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Langt | | | | | | Nær | | | | | |
| H.E | | sf. | | Cyl. | | H.E | | sf. | | Cyl. | |
| H.E | | sf. | | Cyl. | | H.E | | sf. | | Cyl. | |

| |
|---|
| Um praktiskir trupulleikar eru av eygnabreki ella -sjúku, sum krevja serliga útgerð, t.d. lit, reflex, e.a. til einar annars vanligar brillur ella kontaktlinsur, verður biðið um nærri frágreiðing frá eygnalækna (kann eisini viðleggjast) |
| |

**Kostnaðarætlan**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Gløs kr. | | | | | |
| Kontaktlinsur – vanligar kr. | | | | | |
| Finst ein onnur loysn, sum er bíligari enn tann valda, ið tó er nøktandi og ráðilig? | | Ja | | Nei | |
| Um ja, hvør er kostnaðurin? kr. | | | | | |

**Váttan**

| | |
|---|---|
| Upplýsingarnar í hesi váttan eru knýttar at endamálinum við váttanini og kunnu tí einans leggjast til grund fyri málviðgerðini í Almannaverkinum. | |
| Dagfesting | Stempul og undirskrift optikarans ella eygnalæknans |
| | |

**Váttanin skal sendast ella latast inn til Almannaverkið.**



Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo

# Váttan frá optikara/eygnalækna

(umsókn um ískoyti til brillur, kontaktlinsur o.a. út frá einari fíggjarligari meting)

sambært lóg um almannatrygd og tænastur § 19 stk. 1 ella almannapensjónslógini § 12 stk. 1

**Vegleiðing um ískoytismøguleikar eftir einari fíggjarligari meting**

**Vanligu reglurnar um ískoyti til brillur og kontaktlinsur við fíggjarligari meting av tørvinum sambært lóg um almannatrygd og tænastur § 19 stk. 1 ella almannapensjónslógini § 12 stk. 1**

Ein umsókn um fíggjarligt ískoyti eigur vanliga at vera viðgjørd av Almannaverkinum, áðrenn umsøkjarin setir seg fyri útreiðsluni. Er talan um bráfeingis tørv, kann víkjast frá hesi reglu.

Umsóknarblað fæst á heimasíðuni hjá Almannaverkinum. Neyðugt er at leggja váttanir um fíggjarligu viðurskiftini við umsókni.

Vanliga eru tað fíggjarligu viðurskiftini hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga, sum eru avgerandi fyri, um ískoyti kann verða veittur til útreiðslur av brillum og kontaktlinsum. Treytin er, at viðkomandi ikki metist at hava ráð til sjálvur at gjalda útreiðsluna (§ 19 stk. 1 í lóg um almannatrygd og tænastur), ella viðkomandi hevur serliga trupul fíggjarlig kor (§ 12 stk. 1 í almannapensjónslógini).

Sum grundarlag fyri avgerðini um ískoyti ger Almannaverkið eina ítøkiliga meting av fíggjarligu støðuni hjá tí einstaka. Við í metingina verða tikin inntøku-, ognar- og útreiðsluviðurskiftini hjá umsøkjaranum og møguligum hjúnafelaga. Endamálið við lógargreinunum er at veita ískoyti til fólk, sum hava trong fíggjarlig kor. Ískoyti skal forða fyri, at ein annars rímilig fíggjarætlan koppar, orsakað av gjaldinum av brillum ella linsum.

Tað er ein treyt fyri ískoyti til brillur og linsur, at útreiðslan ikki verður goldin av Heilsutrygd, vanlukkutryggingini ella aðrari privatari trygging. Ískoyti verður veitt til tann partin av útreiðsluni, sum viðkomandi sjálvur skal gjalda, tá parturin hjá Heilsutrygd ella endurgjald frá aðrari trygging er drigin frá.

Tað er somuleiðis ein treyt, at útreiðslan av brillunum ella linsunum verður mett vælgrundað, herundir at útreiðslan ikki kann vera minni. Tað er altíð bíligasta nøktandi loysnin, sum ískoyti kann veitast til.

Ískoyti kann fevna um bæði gløs og stell. Ískoyti verður vanliga ikki latin til eykakostnað av seroptikki, t.d. serligum liti, tóning ella antireflex. Er í tí einstaka málinum ein serlig grundgeving frá eygnalækna fyri, at seroptisk loysn er neyðug, kann hetta verða játtað.

Almannaverkið hevur ásett, at prísurin er bíligast ráðiligi, um hann liggur innanfyri hesar vegleiðandi upphæddir:

Vanlig gløs – pr. glas: 500-600 kr.
Við bygningsfeili - pr. glas: 600-1.000 kr. eftir styrki
Tvístyrkt (dupultfokus) - pr. glas: 1.000-2.000 kr. eftir styrki
Brillustell: 800-1.000 kr.

Vegleiðandi prísstøði fyri linsur: 1.600 kr. um árið.

Ískoyti verður veittu eftir rokning við ávísing til optikaran ella eftir kvittan við ávísing til umsøkjaran.
Ískoyti verður veitt til bíligastu nøktandi loysnina.


Staravegur 18 • Postboks 3096 • FO-110 Tórshavn
Tel 360000 • Faks 360001 • av@av.fo • www.av.fo